FØROYA SOSIAL DEMOKRATUR

kemur út eina ferð um vikuna og kostar kr. 2,00 + porto um fjórðingsárið.

Ráðf. blaðstjóri: *MARTIN JOENSEN*

Prent: *A. ØSTÆR's*

HEIMATÍÐINDI

GUÐSTÆNASTUR

16. sunnudag eftir trinitatis verður lestur lisin í Havnar kirkju.

Jóhs. Follend prestur heldur guðstænastu við altargangi í Sandavágs kirkju kl. 12 og í Miðvágs kirkju kl. 18.

KATÓLSKA KIRKJAN

Kl. 9 still messa. Kl. 11 hámessa við prædiku av pater dr. S. Vevers. Kl. 6 kvöldandakt v. prædiku. Pater dr. S. Vevers: Gud, Kristus, Kirkjan.

K.F.U.M. & -K.

Sunnukvöldið kl. 8½ verður felagsfundur í K.F.U.M.

Øll eru vælkomin.

OLJUBINGINI Í SØLMUNDARFIRÐI

Bretska stýrið hevur endiliga góðkent at selja oljubingin í Sólmundarfirði fyri kr. 300.000 til Föroya lögting.

Figgjarnevndin hevur sambært tingsamtykt skipað fyri at bingini verða goldin.

Tingið eigur nú bingi til at at taka ímóti stívum 16.000 tonsum ísenn. Seyrvágs oljubingini taka 4.600 ton og oljubingini í Sólmunda um 12.000 tons.

Her má lögtingið hava gjört eitt kvett, um tað ber seg væl at.

EYKALÁN TIL BUNKASTØÐINA Á DRELNESI

Tingið hevur samtykt at veðhalda (garantera) fyri einum láni uppá 30.000 kr. til bunkastøðina á Tvöroyri.

PENINGASTUÐUL TIL SEYÐABRÚKIÐ

Í ár var stórfelli. Böndur hava sökt um studning at fáa áseyð, har ið felli hevur verið.

Dagin fyri áðrenn tingmenn fóru heim samtykti tingið at veita ein peningastuðul til at keypa sleppingarlomb. Stuðulin kundi koma upp í 15 kr. til lambið.

Menn rokna við, at her er talan um 75.000 kr. í minsta lagi. Stuðulin má tó ikki kosta tinginum meir enn hægst 150.000 kr. var avgerðin í figgjarnevndini.

MENTUNNARGRUNNURIN

Stýrið fyri Mentunnargrunni Föroya lögtings er sett við Richard Long, Johan Poulsen og P. M. Dam.

Nú í tingsetuni, sum var, vórðu reglur fyri grunnsins virki samtyktar.

Grunnurin er uppá stívar 200.000 kr.

Verður tingið at gjalda nakað í hann hvört ár kann hann vaksa seg sterkan og gera munandi um seg mentunarlívinum til frama.

FESKFISKASØLA

	cwt.	£
13/9		
August	131	507
15/9		
Rankin	1576	4564
Nólsoyar Páll	3285	7613
Egholm	500	1673
16/9		
Akranes	350	1090
Vitin	2168	4845

SENDINEVNDIN VERÐUR KANSKA AT STEÐGA

Tað er næstan væntandi, at valg verður í Danmark í heyst. Tosið hevur verið um eina savningarstjórn burtur úr øllum flokkum, men Social Demokrat. og Radikala Vinstra tykjast ikki at kunna samarbeiða við Vinstraflokkinum. Social Demokratar krevja beinan vegin valg.

Verður valg í Danmark, man helst ikki föroyska sendinevndin fara niður fyrr enn avtornað er.

LÆRARATROT

Í nógvum londum hoyrist frá læraratroti, og her í Föroyum sýnist tað eisini at fara og kennast. Í ár hevur verið ógvuliga ringt at fáa vikarar, so tað eru ymisk lærarafólk, sum farin eru á Lærerhöjskolen, sum tikið mugu hava vikarar uttan læraraeksamiu. Og bara 7 næmingar sigast at vera hetta skeiðið á Föroya Lærараskúla. Orsökin til so lítla leitan til hetta týdningarmikla starv man vera hon at ungir lærarar verða so illa löntir. 337 kr. um mánaðin. Og tá má hesin ungi maðurin ganga í skúla í 4 ár at venjast til starvið. Henda tíð kostar stóran pening, og tá ið hann hevur fingið prógvið, fær hann ikki frægari lön enn ein vanligur örindadrongur.

VIÐATROTIÐ

Viðatrotið hevur verið hervigligt í Föroyum nú í seinastuni, tað hevur verið sum tað ringasta undir krígnum, fólk eru næstan ikki sloppin í jörðina fyri kistu.

Men nú var viðaskip komið á Havnini. Men nú valdast um hvör ið fær við, um farmurin ikki er so stórur, at øll kunna fáa, sum ætla at nýta við.

MATUR OG HEILSA

Læknin Skúli Guðjónsson, sum var her í Föroyum sum formaður fyri Ernæringskommissionen, letur illa at matinum í Íslandi. Beinan vegin fólkaskaði, sigur hann. Hin gamli kosturin er avlagdur, og tú etur blikkmat og hetta »harðfrysta« istaðin fyri.

Hetta kann eisini hava tíðindi til okkara, tí her ökist blikkmaturin í stórum. Men fólkið er ofta uttan skuld. Á bygdunum er innlögufólkið burtur, og tá noyðist heimafólkið at halda seg til saltmatin, sum ikki var nógv brúktur í Föroyum fyrr, og sum ivaleyst ikki er heilsugóður, tá ið altíð verður ligið á honum. Og í keypstaðnum verður blikkmaturin keyptur, tí tann toskur ella kalvi, sum kemur upp á land verður latin til ísvirkini, og haðani verður hann so fluttur til útlandið at selja.

GUTTORMUR EYSTUROY

Guttormur Eysturoy sigur, at hann heldur ikki F. S. D. og finnist at, at ikki blaðið verður sent honum, tá ið okkurt honum viðvíkjandi stendur í tí. Væl kann vera, at G. E. er stórbærur maður, men vit halda, at hetta er ovmikið nógv kravt av honum. Fæst hann við politikk og skrivar og talar um politikkarar, so má hann eisini lesa blöðini. Ikki bara »Dagbl.« og »Dimml.«

Jarðarbrúkið og landbúnaðarráðið.

Tá tað í seinasta nr. av Sosialinum verður skrivað um jarðarbrúkið og hvussu neyðugt tað er at driva tað á rættan hátt — soleiðis at vit her í Föroyum kunna framleiða mest möguligt av mjólk, eplum, rótum o. t. l., kundi ein trúð, at hetta blað vísti vegin fyri at fáa betur skil á. Tak nú eitt dömi t. d. mjólkin — hon kostar 78 oyr. í útsölu — men teir flestu, ið lata mjólk her til Havnar fáa nógv minni. Hetta hevur Lögtingið gjögnum Prisráðið valdað uttan at veita teimum, ið framleiða mjólk nakran studul viðvíkjandi biligum kraftfóðri o. t. At mjólkin er ivaleysa dýr fyri teir, ið keypa skulu — her meinast arbeiðarafólk yvirhövur — men ikki grossistar, stórreiðarar o. t. l. ið fáa sína alt ov stóra inntöku so at siga sovandi upp í hendur — hví skulu teir fáa hana fyri sama prís? Og hví kann Föroya Lögting gjögnum Landbúnaðarráðið frá sínum landshandli ikki útvega okkum, ið royna at fáast við neytahald tilsvarandi biligt kraftfóður. Eg havi spurt meg fyri í landshandlinum um hetta — teir hava nógv kraftfóður av ymiskum slögum, men lata ikki til privatmenn, bert handilsmenn, — men til búnaðarfelög, jú, men Havnar búnaðarfelag fær einki — hví? Hvar flóta vit, tá ein maður, ið brúka c. 1½ ton av kraftfóðri hvönn vetur — og kemur til Föroya Lögtings landshandil við peningi í hondini — og einki kann fáa — vit selja bert til keypmenn.

Skal nakað spyrjast burtur úr jarðabrúki her í Havn má annað skil koma á, her má broytast — og tað í stórum. Lógin um mark og hegnfrið má broytast soleiðis, at böndur kring Havnina, og seyðabrúk Havnar býráðs má fáa skyldu at stika sín seyð inni, líkafult sum traðarmenn skulu hegna hann úti, soleiðis at hvör tann, ið seyðin eigur má hava skyldu til eina og hvörja tíð á árinum at hava hann inni á sínum egna — og líkligari var tað fyri landbúnaðarráðið, ið eftir hvat nú frættist kostar grunninum yvir 44.000 kr. um árið til lönir o. a. m., at teir yvirtóku steyrar Meinhart Lamhauges og gyrdu kring Sanatoriið, so Havnar traðarmenn sluppu frá ein stóran part av árinum at frælsa Hoyvíksseyð — og síðan niðan við Sandá fyri Müllars seyði. Um nakað leyp av, kundu teir bjóðað Havnar býráði tað fyri ein lagaligan prís at gyrt inni tað kommunala seyðabrúkið. Flest allar traðir her í Havn eru bæði summar- og vetrafriðaðar, teir ið liggja uttast hava tað sjálvsagt ringast um gyrðingin ikki er í góðum standi — teir mugu taka stötið ofta fyri teir, ið innanfyri liggja, og lata sína gyrðing forfalla.

Hesum og mongum öðrum má landbrúksráðið taka sær av, um ikki alt jarðarbrúk her í Havn skal falla niðurfyri og ivaleyst á öðrum stöðum er nógv at böta um.

Havnar traðarmaður.

Lív-seyður

Sleppingarlomb og brundir kunnu bileggjast nú.

Petur á Heygum,
Vestmanna.

FØROYA BRUNATRYGGING

Hús - innbúgv - vørur - verða tryggjað.

Skrivstovan er opin frá kl. 10-1 og 3-5.
Leygardag - - - 10-2.

GENTA

fær plass.